

*Kjartan, sonur Andreas nr. 2 frá v. saman við trimum gubbunum hjá Boga Lützen: Hjarvil Rasmussen úr Sørvági, Bjarni og Torbjørn Zachariassen. Myndin tikin úti í Klaksvík 3. Juni 1941, dópsdagin hjá Boga*

**Gubbar vóru, sum tað er skrásett:**
Købmand O. F. Joensen, Klaksvig
Kontorist Karl Olsen, Klaksvig
Niels Winther, Klaksvig
**Egil Djurhuus, Thorshavn**

**Gummur vóru**
Fru Sigrid Lützen
Frk. Ingeborg Lützen.

Hetta sigur so, at Egil í august sama ár, sum hann fer til Danmarkar at fáa sær heilsubót, hevur verið tann tá langa teinin í Klaksvík. Hann hevur tá givið Bjarna tað bikar í dópsgávu, sum hann sjálvur hevði fingið frá ættini.

Bjarni var upprunaliga fiskimaður, og hann gjørdist eisini skipari. Menn, sum hava siglt saman við honum, bera Bjarna alt gott.

Bjarni fekk rættiliga ungur prógv sum stýrimaður. Ein søga gongur um Bjarna og Jákup í Brekkuni. Bjarni hevði leigað Sjóborg, og førdi hana sjálvur við last til Aberdeen. Fram komnir hevði Bjarni gjørt seg til at fara í býin, var farin skjótt frá báti, uttan at eftirlíka teirra umbøn um forskot . Jákup í Brekkuni og nakrir aðrir vistu at teir mundu finna Bjarna á Bon Accord, har skipararnir plagdu at fara. Tá teir komu hagar, sluppu teir ikki so langt inn, tí teir ikki vóru hóskandi ílætnir, men nóg langt inn til at veittra til Bjarna og rópa Hey skipper! Bjarni reistist frá borðinum, og kom yvur til teirra. Hann fór í mappuna, og látandi sum hann stillisliga taldi seðlar upp - gestirnir skuldu jú helst ikki varnast tað, sum fór fram - segði hann: "Tú Jákup í Brekkuni sjúgva tær út hiðani - please" og Jákup svaraði siðaliga "Thank You very much" tá teir fóru avstað. Vit vita at Jákup í Brekkuni gekk burtur við eingilska trolaranum Ocean Victor í 1941. Hendingin í Aberdeen er so farin fram, tá Bjarni hevur verið í mesta lagi 25 ár.

Men Bjarni vildi nakað annað, og hann varð ein sjálvlesandi studentur við Janus Djurhuus, sakførara, sum vegleiðari.

Aftaná kríggið fer hann niður at lesa jura. Hetta var roknað fyri at vera so mikið sjáldsamt, at hann fekk umrøðu á forsíðuna av Politiken. Yvirskriftin var nakað so: Fiskeskipper bliver jurist.

Bjarni giftist við Vibeke, sum seinni gjørdist lækni,. Fyrst í 50-unum kemur hann aftur til Klaksvíkar, har hann verður sakførari. Hann byggir eisini Atlantis Bio í Klaksvík.

Hetta er tann tíðin, tá ið nógv sild er at fáa við gørnum norðanfyri Føroyar. Bjarni setur saman við øðrum tunnuvirki á stovn.

Í teimum árunum var nógv at gera hjá einum juristi í Klaksvík. Klaksvíksstríðið leikaði á, og hann førdi sak fyri onkran av teimum, ið kom fyri rættin, og sum helt sína lagnu vera í góðum hondum. Men í longdini man hann hava hildið tað vera nakað trongligt her í tí yrkinum. Janus Djurhuus royndi eisini at virka sum advokatur í Klaksvík, og onkur hevur roynt eftir hann uttan at støðast.

Tá kona Bjarna fekk arbeiði á Landssjúkrahúsinum, flutti hann til Havnar, og hann fylgdi henni eisini til Danmarkar seinni.

Bjarni er deyður fyri einum 25 árum síðani.

# Faktorin og »Caprice«

**J. Símun Hansen hevur í síni frálíku bók Havið og Vit 1 eina nágreiniliga frásøgn um fyritøkuna og menninar aftanfyri Caprice. Hetta er so ein frásøgn, sum eisini lýsir ein part av virkseminum hjá Faktorinum**

Hetta er ein søga um ótroyttiligar menn, sum trúðu uppá eina fiskiveiðu í Føroyum. Fyrsta royndin í Norðoyggjum varð gjørd í 1864 við "Emmu Dortheu" hjá Jørgen Bechs handil, men henda roynd var miseydnað og J Símun Hansen greiðir m.a. víðari frá:

Sama árið verður fyrsta fiskivinnufelag stovnað: "Norderø Fiskeri- og Skibs Selskab af 1865" og millum høvuðsmenninar her er J. C. Djurhuus, sum ikki hevði mist álitið á ta nýggju vinnulívsgrein, skipsfiskiskapin. Tá menn árið eftir fara at tekna aktiur til nýtt fiskiskip, tekur at kalla hvør maður undir.

Nógv tilfari er til um hesa fyritøku og her skal bert okkurt verða nevnt. Viðtøkurnar hjá felagnum verða endurgivnar í Havið og Vit I, og eru tær sera nágreiniligar og professionellar.

Eisini er eitt yvirlit yvir partaeigararnar og eru teir ikki færri enn 100, fyrst og fremst úr Norðoyggjum, men eisini úr Eysturoynni. Jóhannes Joensen, ein av stigtakarunum, av Trøllanesi, pápi hansara og tríggir brøður hansara vóru eisini við í fyritøkuni.

Av Trøllanesi var eisini Absalon Guttormsen ein av undangongumonnunum í hesi ætlan.

## Caprice fer til Íslands at fiska

Í november 1865 fer Jóhannes til Onglands, keypir skonnartina Caprice (63 register tons). í Southampton, ger hana í stand og 3. mai 1866 er hann á Klaksvík við skipinum.

Caprice verður nú útgjørd at fara avstað. Síðsta mai keypa teir útgerð, m.a. 22 toskalínur à 70 favnar, húkar, salt og eikitunnur at salta uppí. Leiðin gekk til Íslands at royna við línu og snøri, men so nógvur var ísurin har uppi, at teir ongantíð fingu samband við land, ei heldur royndt fyri ísi, og máttu sostatt venda aftur – hvassir. 18. juni eru teir longu aftur. Seinast í juni fer Caprice út undir Føroyum, fær 19 toskar fyrsta dagin, men longu 2. juli er hon inni í Lerwick, selur bæði fisk og salt og fer í farmasigling. Fiskisøgan hjá Caprice er longu endað!

## Fýra ára brævaskifti:

Fyrsta túrin við farmi fer Caprice til Trondhjem longu eina viku eftir, at teir eru komnir til Lerwick. Nú helmar ikki í. Teir eru t.d. í Hamburg, Leith, og gera tveir túrar til Spaniu hetta fyrsta árið. Men farmagjøldini vóru lág, og hartil var Caprice ikki í øllum førum vælhóskandi sum farmaskip. Hon var ov djúp, og peningaliga úrtøkan var tí ofta ikki so stór. Jóhannes og faktor Djurhuus skriva av og á sínámillum. Brøvini eru vinarlig og tykist ongin misskiljing at vera millum Jóhannes og hann ta fyrstu tíðina. Ímeðan heldur Caprice á at sigla við farmi eisini næsta ár.

Heima høvdu teir væntað Caprice at komið til Føroya. Tá teir frætta, at Jóhannes ikki kemur heimaftur í 1867 og heldur ikki ætlar sær at koma næsta ár, gerast teir rísnir her heima og skriva honum bræv, har teir undrast yvir ikki at hava frætt frá honum og yvir ikki hava fingið nakran roknskap heldur.

## Svarið frá J. Johnson er skrivað 18. juni sama ár

Tað er langt og sett upp sum ein verjurøða móti teim atfinningum, sum gjørdar verða móti honum. Hann kallar bræv teirra "et Skræmmebrev," spyr hví teir ikki áður hava kravt roknskapin. Jóhannes skrivar um ta skuld, hann vil koma í, um hann kemur til Føroyar, tí hann skal jú betala løn og kost til manning. Peningur er ongin til góðar, sigur John Johnson, sum hann nú kallar seg, tí nú hevur hann riggað Caprice um til rætta skonnart og fingið øll segl gjørd av nýggjum. Hann vónar tó at koma til Føroya næsta vár. Ímeðan vil hann royna at fáa nakað av peningi at loypa av.



*Ein framburðsmaður av Trøllanesi var Absalon Guttormson, sum eisini settu í Caprice og var ein av nevndarlimunum*

Brævið, sum er skrivað í Grikkalandi, endar soleiðis:

"Men dersom der en mangel paa Tiltro, da er min Skrivning forgjæves; dog førend I tager en anden Vej, saa er det mit Raad, at I vil overveje det. Jeg forlanger ingen Eftergivenhed, men ikkuns hvad jeg haaber, at I ikke vil nægte mig: En betænkt, retfærdig Dom.

Med hilsen og agtelse,
Deres forbundne
John Johnson.